# Nøvn

Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo



## Minningarorð

# Einar Suðring, Fuglafjørður



Oktobur 2009 legði navnin Einar abbi árarnar inn, 98 ára gamal. Hesin fryntligi, skemtingarsami, bersøgni og áhugaverdi maðurin, spákandi Norðuri á Bakka, við ørmunum aftur um bak, einari ball í munninum og keppi á høvdinum. Ja hetta er ein av myndunum, eg havi av abba mínum á hansara heystardøgum. Uttan iva á veg niðan á fótbóltsvøllin at hyggja eftir fótbólti, sum hevði hansara stóra áhuga. Og keppurin - jú hann snaraði runt á høvdinum og hevði onga fasta legu undir dystinum, meðan hann í gummiskóm royndi at sparka fyri at fáa bóltin í netið. Hann mátti hava pláss rundan um seg." Nei nei, teir duga ikki at skjóta uppá mál og spæla ikki saman". Hetta vórðu viðmerkingarnar til hvønn dyst." Hevði eg verið ungur, so hevði eg gjørt minst 20 mál" og so flenti hann so hjartaliga, meðan ballpakkin bleiv tikin úr lummanum.

Einar Joen Oluf Petersen varð borðin í heim í Fuglafirði 2. sept. 1911. Sonur Dánjal Jákup á Bakkanum og Suðuroyar Kristinu. Tey fingu 11 børn, 7 synir og 4 døtur. Sum 4 ára gamal fór abbi, saman við bróðurinum Sofusi, suður til ommu sína í Sandvík at búgva. Barnaskógvarnir blivu traðkaðir í Kvilt í Sandvík, og mangar søgur frá barna og ungdómsárunum í suðri eru fortaldar okkum. Sjálvur greiddi abbi frá tíðini sum óviti, til fjals og fjøru. Tað, sum hugtók mest, vóru túrarnir í haganum á rossabaki við" Sandinginum" og teir mongu túrarnir í bjørgunum og serliga á Ásmundarstakkinum. Tað vóru tó ikki bert góðar løtur frá hesari tíð, men mangar strævnar løtur eisini. Einar fór til sjós sum blaðungur, og sum 20 ára gamal flutti hann norður aftur til Fuglafjarðar at búgva. Hann giftist við Palmu Poulsen, dóttur Johan Paula og Petru, og flutti hann inn til verforeldrini at búgva tað fyrstu tíðina. Minnist ofta hann segði mær, hvussu væl verforeldrini tóku ímóti sær, tá ið hann flutti aftur til Fuglafjarðar.

Einar og Palma settu búgv Norðuri á bakka í Fuglafirði, og fingu tey sjey børn. Alexsandra og Maria búgva í Danmark, Dinna, Hjørleif, Áku og Petur búgva í Fuglafirði, og Niels býr á Skála. Abbi sigldi nógv ár sum motorpassari, og tá ið hann gavst at sigla, hevði hann siglt væl yvir 40 ár. Øll krígsárini sigldi hann, og mangar eru søgurnar frá honum um hesa ótryggu tíð á sjónum og um hansara leiklut sum minuskjútti. Tað var mangan buldraligt, og upplivdi hann, at aðrar sluppir fórust í sama illveðri, sum teir vóru staddir í."Eg havi nógv at takka Guði fyri", segði hann altíð, tá tosað bleiv um sjólívið, "men eg havi verið giftur við verðsins bestu konu, sum tók sær av børnunum, meðan eg var burtur". Jú, satt er tað, og untist teimum at halda gullbrúdleyp saman. Omma andaðist í desembur 1988, og tómrúmið í heiminum Norðuri á Bakka gjørdist stórt.

Tá abbi gavst at sigla, fór hann at arbeiða á Skála skipasmiðju sum sveisari í nøkur ár. Eina stutta tíð arbeiddi hann hjá S.E.V, og tey seinastu arbeiðsárini arbeiddi hann á Handils og frystivirkinum í Fuglafirði, og gavst hann at arbeiða, stutt áðrenn hann bleiv áttati ár. Síggi hann fyri mær, tá hann greiddi okkum frá, at teir høvdu havt vitjan á fiskavirkinum av danska forsætisráðharranum, Poul Schlüter saman við løgmanni. Abbi stendur, saman við øðrum monnum, við eitt borð og skilur fisk, tá Poul Schlüter stingur høvdið fram ímillum teir og sigur."Nå, det er nogle store helleflyndrer, i har her". Abbi vendir sær á og sigur við Schlüter. "Her er det godav først". "Nå ja, godav godav" sigur Schlüter, og so flentu teir báðir og fingu eitt gott prát saman. "Jú jú, man skal altíð biðja góðan dag, høgur sum lágur". Soleiðis var hansara lyndi – fryntligur, bersøgin og altíð klárur við einum svari. Hann roykti sum ein trolari og ein dagin segði ein maður við hann." Einar, um tú ikki hevði roykt so illa og leingi, so kundi tú átt eina flotta Villa?". "Tað er møguligt, men tú hevur ongantíð roykt, hvar er tín Villa?". Jú væl dugdi hann at svara aftur. Ótolin var abbi eisini. Um avtala var gjørd við onkran um eitt klokkuslett, hann skuldi heintast, og viðkomandi var ov seinur, so segði hann altíð: "Tú kanst ikki brúkast umborð á trolara". Eitt klokkuslett var eitt klokkuslett. Serliga var tað, tá ið hann skuldi koyrast út at geva seyðinum, at hann var ótolin. Men tá tað var sagt, so flenti hann so hjartaliga.

Áhuga fyri viðurskiftum í samfelagnum hevði hann eisini, og viðmerkingarnar vóru nógvar við hvørt døgurðaborð, meðan tíðindini vóru. Á politiska pallinum var tað javnaðarflokkurin, sum fekk krossin við hvørt valið. "Tað var verkamaðurin, sum helt landinum uppi", plagdi hann at siga. Á ítróttarliga pallinum var hann stoltur. Rætti seg upp um góðu ítróttaravrikini hjá børnum, abbabørnum og langabbabørnum. "Ein hjá mer (mær)",plagdi hann at siga á suðuroyardialekt. Eftirkomarar hava vunnið mong føroyameistaraheiti í ymiskum ítróttargreinum, og hevur hann havt umboðan á fótbóltslandsliðnum, hondbóltslandsliðnum, flogbóltslandsliðnum, svimjilandsliðnum og nú eisini fimleikalandsliðnum. Eisini hava eftirkomarar, búsitandi í Danmark, klára seg sera gott. Ikki sørt, hann reypaði um hesi ítróttaravrik. Og so hansara stóri áhugi til sjólívið. "Um sjómaðurin hevur tað gott, so hava øll tað gott", plagdi hann at siga. Sjálvur sigldi eg í nøkur ár við partrolara, og plagdi hann at ringja umborð fyri at frætta um fiskarí. "Hvar eru tit staddir, hvat hava tit fiska og hvørjum dýpi eru tit á?", spurdi hann. Og tá illveður var, kundi hann bara biðja okkum koma inn at kroka, helt ikki at vit skuldu leggja ov nógv fyri. Tá vit høvdu landað, vildi hann kenna vektina og ikki minst prísin. Kendu vit ikki prísin, so vóru vit alt ov lítið áhugaðir. "Tit mega kenna inntøkuna av túrinum beinanvegin", segði hann. Fekk hann prísin og vektina, so fór hann at rokna út, hvat inntøkan hjá mær hevði verið fyri túrin. Jú áhugin fyri fiskaríinum var stórur, og frøddist hann, tá tað gekk øllum væl.

Tónleikur hevði eisini hansara stóra áhuga, og stuttligt var at síggja hann tríva í mandolinuna og hoyra hann syngja og spæla av lívsins kreftum. "Nei, sangari havi eg ongantíð verið, ella er tað mandolinin, sum ikki stemmar", segði hann við einum skálkabrosi. Men eg haldi, at tað var á heilt góðari leið. Síggi hann fyri mær, har hann situr í stólinum, droymandi í aðrari verð og lurtar eftir vøkrum sálmasangi. Letur armin sveima aftur og fram. Jú blundandi dirigerðar hann, livir við, droymir. "Bert ein dag, eitt bil í senn eg fái", tað varð hansara sálmur.

Abbi flutti á ellisheim, tá hann var blivin 92 ára gamal. Sjúka forðaði honum at klára seg sjálvan, og var hann á ellisheiminum tey seinastu seks árini, líka til hann legði árarnar inn. Starvsfólkið vóru góð við hann og tóku sær væl av honum. Heimið Norðuri á Bakka í Fuglafirði var eitt andaligt og fjálgt heim. Heimið saman við ommu og abba, bleiv mítt barndómsheim. Kundi ikki fingið betri.

Takk fyri alt omma og abbi.

**Einar**

### Bert ein dag

orð og lag: ókendur Lina Sandell
umsett: Jógvan Nolsøe

*Bert ein dag, eitt bil í senn eg fái.*
*Ríka troyst til stirda sál og ond!*
*Hví nú stúra? Lít á Harrans náði,*
*alt jú hvílir í Guds faðirs hond.*
*Hann, sum alt mítt ber í faðir barmi,*
*hvønn ein dag á fold mær senda vil*
*partin mín av frøi og av harmi,*
*sum eg júst man treingja til.*

*Hann mær nær vil allar dagar vera*
*veita náði mær til hvørja tíð,*
*hvørja tunga stúran hann vil bera.*
*»Kraft og ráð«, so eru orð hans blíð.*
*Hann vil verja hvørt eitt barn sítt kæra,*
*metta sálir við sítt náðiborð.*
*»Sum tín dagur skal tín styrki vera«*
*– so hans lyftiríku orð.*

*Hjálp mær tá at líta trygt við vissu*
*bert á tíni lyfti, Harri kær',*
*so ei trúar djúpa frið eg missi,*
*sum títt orð bar mínum hjarta nær!*
*– Vil í lund mær stúran taka ráðið,*
*veit mær styrk av tíni faðirhond;*
*bert ein dag, eitt bil í senn eg fái,*
*takkar stillan eyðmjúk ond!*



*Eirikur Norðberg (v.m.) fær handað prógvið*
*Mynd: Bárður Norðberg*

## Eirikur Norðberg:

# Besti maskinmeistari

Eirikur Norðberg fekk 24. juni prógv sum maskinmeistari á DTU í Danmark. Umframt at fáa prógv sum maskinmeistari, fekk hann eisini handaða heiðursgávu frá A.P. Møller Mærsk fyri besta avrik.

Eirikur er ættaður úr Vági og er sonur Jóanes og Gunnleyg Norðberg. Eirikur er giftur við Ingunn Norðberg úr Tórshavn. Maskinfakið er ikki ókent í familjuni, bæði pápin og abbin eru maskinmeistarar.